

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 03 - 2012

# Lønin í norsku oljuvinnuni nógv hægri enn aðrastaðni

Meðallønin hjá teimum, sum arbeiða í norsku oljuvinnuni, er farin upp um eina millión krónur, og tað er tvær ferðir meiri enn altjóða meðallønin Tað loysir seg væl at arbeiða í teirri norsku oljuvinnuni, tí sambært nýggjum tølum hjá blaðnum Dagens Næringsliv er meðallønin í vinnuni 1,07 millión norskar krónur um árið. Tað er nógv meiri, enn fólk forvinna í somu vinnu aðrastaðni, tí heimsmeðallønin er sambært blaðnum 477.400 norskar krónur. Tølini, sum yvirlitið hjá Dagens Næringsliv byggir á, eru úr einari kanning hjá fyritøkuni Hays Oil & Gas, sum umfatar 50 lond og 24 ymisk arbeiðsøki innan oljuvinnuna. Tey vísa, at næst eftir Noreg koma Avstralia, Brunei, Kanada og USA. -Eg haldi ikki, at tey norsku lønartølini eru skelkandi stór, men tað kemur óvart á meg, at tey eru tvær ferðir størri enn altjóða meðaltølini, sigur formaðurin í Norges Ingeniør- og Teknologorganisasjon, Marit Stykket, við Dagens Næringsliv. Stjórin í North Energy, Erik Karlstrøm, heldur, at tann høga meðallønin í norsku oljuvinnuni er ein avleiðing av, at Noreg hevur klakt ov fáar verkfrøðingar tey seinastu nógvu árini. -Fólk her vilja ikki vera verkfrøðingar, so tað er ikki so løgið, at fyritøkur rinda tað, sum tær noyðast at rinda, sigur Erik Karlstrøm við Dagens Næringsliv. Tey, sum arbeiða í vinnuni, vænta sær enn meiri í løn, tí sambært kanningini væntar triði hvør, at lønin fer at hækka heilt upp ímóti 10 prosentum í ár.